tíðindablaðið
# sosialurin

Nr. 144 Leygardagur 2. august 1997 71. árgangur Kr. 7,00



## Andrass Róin bleiv stjóri á TFL

Landsstýrismaðurin við samskiftismálum hevur sett telefonverksstjóra

*Síða 5*

## 500 vágbingar í Gundadali

Stórur spenningur er áðrenn steypafinaluna millum VB og GÍ í Gundadali í morgin. Roknað verður við, at í minsta lagi fimmhundrað vágbingar verða at síggja til dystin. Og hetta eru bara vágbingar, sum koma sunnan úr Vági. Haraftrat koma so allir teir, ið búgva norðanfjørðs. Í Gøtu meta teir seg vera væl fyri til finaludystin, nú teir júst hava leikt fyri 42.000 áskoðarum í Glasgow. Annars er Jens Martin Knudsen leikbannaður, men teir hava fingið annað gott fólk í staðin

*Síða 8*

# Aftur arbeiði á virkinum í Vági

Nú er dagurin, sum vágbingar hava bíðað eftir í áravís, ikki langt burturi. Felagið Miðalberg hevur nevniliga gjørt leigusáttmála við P/F Fiskavirking um fyrrverandi Polarfrost. Stjórin í Miðalberg, Jákup Olsen, sigur, at ætlanin er at nýta virkið til heilan uppsjóvarfisk. Fiskurin skal seljast til m.a. Japans, Russlands og Póllands *Síða 4*



# Bretar slept rættindum kring Rokkin

96.000 kvadratkilometrar ella ein radius upp á 200 fjórðingar kring Rokkin. Tað er økið, bretar ikki longur hava einarættin til. Avgerðin ávirkar vestasta partin av miðlinjuni millum Føroyar og Bretland

*Síða 3*



VØRU-KOYRING
FLYTING
ÚR FØROYUM TIL FØROYA
Goymsla & Flytikassar
TILBOÐ verða givin
Lagaligir prísir!
Pf. HP trading
TRANSPORT
Tlf. 17272
Fax 15009

# Bretar slept fiskiveiðirættindum við Rokkin

*96.000 kvadratkilometrar ella ein radius upp á 200 fjórðingar kring Rokkin. Tað er fiskiveiðiøkið, bretar ikki longur hava einarætt til. Avgerðin ávirkar vestasta partin av miðlinjuni millum Bretland og Føroyar*

GRÆKARIS DJURHUUS MAGNUSSEN

Tað kemur onki óvart á formannin í Oljuráðleggingarnevndini, Árna Olafsson, nú bretar boða frá, at teir sleppa kravinum upp á fiskiveiðiøkið kring Rokkin.

Árni Olafsson sigur, at „Major-stjórnin" hevði ætlanir at taka hesa somu avgerðina, men valdi at bíða til eftir valið.



*Bretski uttanríkisráðharrin Robin Cook hevur gjørt av, at bretar skulu góðkenna altjóða ST-havrættarsáttmálan. Tískil hava teir slept kravinum upp á eitt 96.000 kvadratkilometrar stórt øki kring Rokkin*

Nú veit blaðið Guardian so at siga, at bretski uttanríkisráðharrin, Robin Cook, hevur gjørt av, at ætlanin skal verða veruleiki. Kravið upp á fiskiveiðiðøkið upp á 200 fjórðingar í ein radius kring Rokkin skal sleppast. Men kravið upp á sjálvan Rokkin halda bretar fast um.

**Ávirkar miðlinjuna**

Formaðurin í Oljuráðleggingarnevndini sigur við Sosialin, at avgerðin hjá bretum fær ávísa ávirkan á nógv umrøddu miðlinjuna millum Bretland og Føroyar.

– Bretar verða noyddir at tekna vestasta partin av miðlinjuni umaftur. Hetta fær onga stóra ávirkan, men hon er kortini til okkara fyrimunar, sigur Árni Olafsson.

Hann vísir á, at føroyingar í marknaðsamráðingunum alla tíðina hava gjørt krav upp á eina ávísa linju. Hetta kravið verður ikki broytt nú. Hinvegin kann væl vera, at føroyska kravið nú fer at standa eitt vet sterkari mótvegis bretum.

Annars er tað serliga á fiskiveiðiøkinum, avgerðin hjá bretum fer at hava ávirkan. Bretar kunnu t.d. ikki longur seta 200 fjórðingar fiskimarkið út frá Rokkinum. Men av tí, at teir framvegis gera krav upp á sjálvan Rokkin, kunnu teir samstundis gera krav upp á eitt sjóøkið, ið er 12 fjórðingar kring henda umstrýdda klettin.

**Havrættarnevndin**

Tað er fyrst og fremst bretska embætisvaldið, ið er orsøkin til, at bretar nú sleppa kravinum upp á økið kring Rokkin. Árni Olafsson sigur, at bretska embætisverkið hevur ynskt limaskap, ella at góðkenna, altjóða ST-havrættarsáttmálan.

– Við at góðkenna Havrættarsáttmálan kunnu bretar fáa beinleiðis umboðan í Havrættarnevndina. Men fyri at fáa umboðan, mugu teir góðkenna sáttmálan. Og við at góðkenna sáttmálan, mugu teir sleppa kravinum upp á sjóøkið kring Rokkin, sigur Árni Olafsson.

Hetta merkir so aftur, at tað at bretar nú góðkenna altjóða ST-havrættarsáttmálan ber í sær, at teir noyðast at sleppa møguleikanum at seta fiskimørk út frá óbygdum steinum og klettum.

Bretskir sjómenn eru í øðini um avgerðina hjá Robin Cook. Guardian sigur millum annað, at bretar við avgerðini kunnu missa virði fyri óteljandi milliardir pund í fiski og mineralum av ymsum slag.



*Avgerðin hjá bretum at sleppa kravinum um fiskiveiðiøkið kring Rokkin, ávirkar bara Føroya í lítlan mun, heldur Árni Olafsson, formaður í Oljuráðleggingarnevndini*

# Umhugsa nýtt skip fyri Skálaberg

*Skálaberg er júst farin undir pólkst flagg. Í hesum sambandi umhugsar J.F.K. Trol at keypa annað skip*

GRÆKARIS DJURHUUS MAGNUSSEN

Fyri nøkrum fáum døgum síðani fór Skálaberg úr Føroyum undir pólskum flaggi. Og mánadagin fer danska Sjóferðslustýrið at hyggja at einum skipi, sum J. F. K. Trol umhugsar at keypa í staðin fyri Skálaberg.

Sum skilst er endalig støða ikki tikin til, um skipið verður keypt, men góðkennir Sjóferðslustýrið skipið uttan stórvegis viðmerkingar, so kemur tað undir føroyskt flagg um stutta tíð.

Skipið, talan er um, hevur størri frystilast enn Skálaberg, men er annars nakað minni.

**Skálaberg við Svalbard**

Á J. F. K. Trol verður sagt, at Skálaberg fer at royna í Svalbard zonuni – ella við Bjarnoynna.

Hóast Skálaberg nú er farin undir pólskt flagg, er meginparturin av manningini føroysk. Bara tríggir pólendingar eru við: Ein flaggskipari, ein maskinmaður og ein dekkari.

Fyribils er talan um, at Skálaberg skal vera undir pólskum flaggi næstu fýra mánaðirnar. Víðari støða er ikki tikin enn.



*J. F. K. Trol umhugsar at keypa nýtt skip fyri Skálaberg. Her sæst systirskipið hjá Skálabergi, Sundaberg, liggja við bryggju*

